Álit

í

løgtingsmáli nr. 96/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin) (Mvg-frítøka fyri útleigan av kampingplássi)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 5. mars 2021, og eftir 1. viðgerð 9. mars 2021 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 25. mars og 8. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, saman við TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Magnus Rasmussen, Jákup Mikkelsen, Bill Justinussen, Kristin Michelsen og Páll á Reynatúgvu) vísir á, at uppskotið er gjørt fyri at betra kappingarstøðuna hjá kampingplássum, soleiðis at útleigan av kampingplássi verður javnsett við útleigan av kamari á hotelli og gistingarhúsi við atliti at meirvirðisgjaldi.

Sambært galdandi lóggávu er útleigan av kamari á hotelli, gistingarhúsi o.tíl. undantikin meirvirðisgjaldi. Útleigan av kampingplássi er hinvegin avgjaldsskyldug, bæði tá kampingplássið er privat, og tá kampingplássið er kommunalt.

Endamálið við uppskotinum er at javnseta útleigan av kampingplássi við útleigan av kamari á hotelli og gistingarhúsi við atliti at meirvirðisgjaldi.

Við uppskotinum verða reglurnar fyri útleigan av kampingplássi javnsettar við reglurnar fyri útleigan av kamari á hotelli og gistingarhúsi.

Nevndini er upplýst, at fíggjarligu avleiðingarnar fyri landið verða mettar til 250.000 kr. um árið. Hetta er mett við støði í miðaltølum frá 2018-2020.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Aksel V. Johannesen og Ruth Vang) hevur hesar viðmerkingar:

Minnilutin tekur ikki undir við málinum. Vit hava eftirhondini fleiri enn 30 undantøk í MVG-lógini. Minnilutin heldur, at vit eiga at steðga eitt sindur á við at geva undantøk í MVG-lógini. Hetta tí at tað í ávísan mun kann skapa eina ójavna kapping, men eisini tí nógv av undantøkunum fyrst og fremst koma útlendskum ferðafólkum til góðar. Eitt nú er MVG-frítøka á allari gisting á hotell- og gistingarhúsum, á leigubilum og nú eisini á kampingplássum. Sjálvandi gera føroyingar brúk av hesum tænastum, men í størsta mun eru tað útlendingar, ið brúka hesar tænastur.

Eitt av endamálunum við ferðavinnuni er, at ferðafólkini leggja pening eftir seg her í Føroyum. Eisini til landskassan. Tað gera tey ikki, tá vit aftur og aftur geva MVG-frítøku til vørur og tænastur, sum útlendsk ferðafólk keypa, tá tey eru her og vitja okkum.

Minnilutin mælir tískil til, at vit endurskoða undantøkini í MVG-lógini, soleiðis at tey sum vitja okkara land sjálvandi eisini eru við til at gjalda MVG í landskassan; tó má kappingarførið hjá okkum sum ferðavinnuland ikki oyðileggjast.

Aksel V. Johannesen hevur harumframt hesar viðmerkingar:
Tað er ikki vinnulívið, men borgarin, sum rindar MVG. Tí eiga vit at hugsa um borgaran, um undantøk skulu gerast. Minnilutin heldur, at nøkur av undantøkunum kunnu heilt ella partvíst avtakast, og at vit ístaðin kunnu lækka ella heilt avtaka MVG á nakrar av húsarhaldsvørunum, sum øll hava tørv á í gerandisdegnum. Her verður hugsað um t.d. breyð, mjólk, frukt, grønmeti o.s.fr. Hetta hevði gagnað øllum húsarhaldum og ikki minst hevði hetta komið væl við hjá barnafamiljunum.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 14. apríl 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Páll á Reynatúgvu
	Ruth Vang	